

*Ætlandi kostar nýggi smábarna- og frítíðarskúlin einar 12 mió kr*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Reisigildi í Hoyvík

**Fríggjadagin varð nýggi smábarna- og frítíðarskúlin í Hoyvík reistur**

REISIGILDI
*Jákup Mørk*

Í bygninginum, sum stendur millum Vegin Langa og Hoyvíkar skúla, verða í ovaru hæddini fýra skúlastovur til teir yngstu flokkarnar og í niðaru hæddini hølir til frítíðarskúla.

Um fáar vikur verður skúlin innilokaður og farast kann undir innrættingararbeiðið. Skúlabygningurin skal verða liðugur tíðliga næsta ár.

Tað er byggifelagið ÁTS við Karstin Vang, sum stendur fyri byggingini. Selmar Nielsen hevur teknað bygningin, sum væntandi kostar einar 12 mió kr.

# Nýggj salong í Vestmanna

**Mánadagin letur Marian Klein Ivansdóttir upp í hárfríðkunarstovuna, Royal, í Vestmanna**

HÁRFRÍÐKAN
*Jákup Mørk*



*Marian Klein Ivansdóttir er sjálv vælnøgd, nú nýggja harfríðkunarstovan er liðugt innrættað*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Marian, sum sjálv er úr Vestmanna, varð í 2003 útlærd hjá Tótu í Havn, men seinastu tíðina hevur hon klipt á Bronx í Havn.

Frá mánadegnum verður hon tó egin harri á Hornavegi í Vestmanna, tá hon letur upp í nýinnrættaðu hølunum.

Umframt at hava salong í Vestmanna, fer Marian tó framvegis eisini at klippa í Havn, har hon hevur gjørt samstarvsavtalu við Look á Landavegnum.

Nú Marian letur dyrnar upp, verður móttøka í nýggju hølunum í Vestmanna, og verður hendan í dag frá kl. 16-19.

Eisini hevur salongin egna heimasíðu, og er hendan at finna á slóðini, www.royal.fo

# Tryggingartakararnir stovna ognarfelag

**Umboðsráðið, ið varð valt av tryggingartakarunum í Lív í summar, stovnaði fríggjadagin nýtt ognarfelag**

OGNARFELAG
*Jákup Mørk*

Nýggja felagið, ið skal eiga helvtina av partabrøvunum í P/F Føroya Lívstrygging, hevur fingið navnið Ognarfelagið Lív.

Felagið er ein liður í avtalu millum landsstýrið og tryggingartakararnar, har avtalað er, at landsstýrið skal avhenda 50 prosent av partabrøvunum í Lív til felag hjá tryggingartakarunum í hesum árinum.

Umboðsráðið, ið situr, verður eisini umboðsráð í nýggja felagnum, til tey 50 prosentini av partabrøvunum í Lív eru avhendað felagnum. Síðani verður skipað fyri nýggjum vali millum tryggingartakararnar

Formaður í nýggja felagnum er Jógvan Mørkøre og næstformaður er Palli Petersen. Hinir umboðsráðslimirnir eru Leif Ellingsgaard, Andrias Ziska og Gunnleivur Dalgarð.

# Fólk ansa ikki eftir vindinum

Tvær ferðir leygarnáttina varð løgreglan í Havn boðsend, tá talan var um stormskaðar. Í einum føri varnaðust fólk í Hornabø, at leysar takplátur fuku úti á vegnum. Hetta eru plátur, sum helst ikki hava verið tryggjaðar nóg væl móti vindinum.

Í hinum førinum var talan um stormskaða, har løgreglan mátti hjálpa til at fáa nóg gott tamarhald á støðuni.

-mørk

## Tikin fyri rúsdrekkakoyring

Stutt eftir klokkan 02 sunnunáttina tók løgreglan í Havn ein bilførara í býnum, sum helst verður ákærdur fyri at koyra ávirkaður av rúsdrekka.

- Eftir illgruna um, at bilførarin var ávirkaður, tóku vit hann við á støðina, har læknin tók blóðroynd av honum, sigur løgreglan, sum í morgun eisini tók ein annan bilførara, sum noyddist á støðina til blóðroynd.

**-vilmund**

## Bátur sakk í Vágsbotni

Sunnumorgunin fekk løgreglan í Havn fráboðan um, at ein bátur lá sokkin undir Bryggjubakka í Vágsbotni.

Tá ið komið var á staðið, sást bert ein partur av øðrum stevninum undan vatnsskorpuni.

Løgreglan sigur, at hetta var ein minni glastrevjabátur.

- Vit boðaðu Tórshavnar Havn frá hesum, tí teir hava yvirlit yvir, hvør eigur bátarnar, sum liggja við brúgvarnar og fyri teym í Havn.

Løgreglan heldur, at eigarin av bátinum helst ikki hevur gáað nóg væl um vátveðrið, sum verið hevur seinastu dagarnar.

**-vilmund**

## Ferðsluóhapp í vesturbýnum

Millum klokkan 01 og 02 sunnunáttina fekk løgreglan í Havn fráboðan um eitt ferðsluóhapp í vesturbýnum.

Tað vísti seg, at annar bilførarin ikki hevði hildið treytaleysu víkiskylduna og hevði rent í ein annan bil, sum kom fram við.

Tá ið løgreglan kom á staðið, var annar bilførarin rýmdur, men hevði kortini tosað við bilføraran á hinum bilinum, sum bíðaði eftir løgregluni.

- Stutt eftir fingu vit kortini fatur á bilføraranum, sum var farin av staðnum. Tá ið hann blásti í ballónina, stóðst illgruni um, at hann var ávirkaður. Tí tóku vit hann við á støðina til blóðroynd, sigur løgreglan.

Eingin fólkaskaði hendi, tá ið bilarnir í vesturbýnum stoyttu saman.

**-vilmund**

## Ungir menn endaðu á skaðastovuni

Tað er ikki óvanligt longur, at fólk verða álopin í býnum í Havn, og í so máta var sunnunáttin einki undantak.

Løgreglan í Havn sigur, at tveir ungir menn, sum vórðu álopnir í gongugøtuni í Havn, endaðu á skaðastovuni, og løgreglan metir, at talan er um harðskap, og at eitt harðskapsmál fer at spyrjast burtur úr hesum.

- Ungu menninir eru kannaðir á skaðastovuni og koma seinni heim higar til avhoyringar um, hvat hendi teimum í býnum, sigur løgreglan sum heldur, at alt týðir uppá, at hetta verður eitt harðskapsmál.

**-vilmund**

## Rendi í tunnilsveggin

Eingin mansskaði hendi, tá ið ein bilur stutt eftir midnátt sunnunáttina rendi í tunnilsveggin í Leirvíkartunlinum.

Í samdøgurfrágreiðingini hjá løgregluni í Havn stendur einki um, hvør orsøkin var til óhappið, sum tíbetur ikki endaði við mansskaða.

Meðan Leirvíkartunnilin er góðar at koyra í og er lutfalsliga væl upplýstur, er verri vorðið í Norðskálatunlinum, har støðugt er vegarbeiði.

**-vilmund**

## Maður skallaður á Skálatrøð

Nógvi vindurin leygarnáttina gjørdi helst sítt, soleiðis at fólk fyri tað mesta hava hildið seg innandura. Vakthavandi á politistøðini í Havn sigur í øllum førum, at tað hevur verið ógvuliga avmarkað, hvussu nógv tey høvdu at gera fríggjakvøldið.

Um eitt-tíðina varð løgreglan tó boðsend, tá tveir menn komu til ilnar uttan fyri Glitnir á Skálatrøð. Tað endaði við, at annar maðurin varð skallaður, og hetta er nú skrásett sum harðskapsmál.

Í aðrar mátar tóktust fólk halda seg innandura, og nógvi vinduri gjørdi helst eisini sítt til, at gøturnar í býnum vóru at kalla manntómar, tá ymsu dansistøðini lótu dyrnar aftur.

**-mørk**